# AÐ Á JØRÐ



## 12 BØRN

Tá fólkatalið á Fámjin var uppá tað mesta – í 1993 – búðu 135 fólk her. Í farna mánaði var talið 108 fólk.
Tað sum kortini er serstakt við hesi bygdini, sum mong meta sum fjarskotna er, at ikki færri enn 12 børn eru undir skúlaaldur.
Hetta svarar til væl omanfyri 10% av íbúgvunum, og skuldi í so máta borga fyri eini bygd við framtíð.

## Maki úr bygdini

Saman við hinum ungu familjunum í bygdini trívist Aslaug í Smiðjuni her í Fámjin. Og tað ger hon, hóast hon má koyra til Tvøroyrar at útinna starv sítt sum sjúkrarøktarfrøðingur á Suðuroyar Sjúkrahúsi.
– Hetta er bara nakað sum eg havi vant meg til. Eg gangi ikki dagliga og hugsi um, at eg skal koyra hetta strekkið, slær hon fast.
At tað lutvíst eru so nógvar ungar familjur í bygdini, hevur sjálvandi sína orsøk: Flestu teirra eru annaðhvørt uppvaksin her, ella hava búsett seg her saman við makanum.
Í Aslaugsa føri var hetta ikki neyðugt, tí maðurin eisini er ættaður hiðani úr bygdini. Sama ger seg galdandi fyri systur hennara, sum eisini hevur maka úr bygdini.
– Ja, tað vísir seg at vera lættari at fáa fólk at búseta seg her, um annar parturin er hiðani. Eg trúgvi ikki at fólk koma higar aðrastaðni frá, sigur Aslaug.

**BÚSETING**

*Saman við manninum, Arnbjørn í Smiðjuni, fluttu tey inn í nýggj hús í Fámjin fyri seks árum síðani. – Her trívast vit sera væl, sigur 32 ára gamla Aslaug, sum her er avmyndað saman við manni og trimum børnum teirra*

*Mynd: Jens Kristian Vang*